# Krista vann hópin av heiðurs-merkjum




*Krista Mørkøre gjørdi við átta heiðursmerkjum bart í stóru týsku svimjikappingini, German Open*

**SVIMJING** Krista Mørkøre úr Klaksvík vann trý silvur- og fimm bronsuheiðursmerki í German Open-svimjikappingini um vikuskiftið

Hilmar Jan Hansen

Longu hósdagin legði Krista botnin, tá hon megnaði at klára eina kravtíð til EM-kappingina fyri brekað, sum verður í Berlin í summar, og síðani helmaði hon ikki í, men fekk hópin av góðum úrslitum í German Open.

Krista Mørkøre var í kappingum bæði fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin, og allar dagarnar megnaði hon at vinna heiðursmerki, umframt at hon setti fleiri persónlig met.

Tá avtornaði, hevði 12 ára gamla Krista, sum dagliga venur og svimjur í svimjifelagnum Ægir, vunnið trý silvur- og fimm bronsuheiðursmerki, sum tey í ÍSB fegnast stórliga um.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Estetisk FM-kapping

Hilmar Jan Hansen

Seinnapartin leygardagin verður seinasta kappingin í estetiskum fimleiki hetta kappingarárið í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, og er hesa ferð talan um føroyameistarakappingina hjá gentum, kvinnuunglingum og kvinnum.

Tilsamans eru 10 lið úr Havnar Fimleikafelag, Ljósinum og Støkk meldað til kappingina, sum byrjar klokkan 15. Nummar eitt, tvey og trý fáa heiðursmerki, og haraftrat verður steyp latið til ognar í hvørjum bólki sær.

Leygardagin vóru FM-kappingarnar hjá teimum yngru, og har stóð kappingin serliga millum Støkk og Havnar Fimleikafelag. Hjá pinkum vann Støkk og hjá smágentum vann Havnar Fimleikafelag. Eisini var B-kapping á skránni, og tá vann Støkk hjá pinkum og smágentum og Havnar Fimleikafelag hjá gentum.

hilmarjan@sosialurin.fo




*Millum steypadystirnar í kvøld er tann við Løkin millum NSÍ og EB/Streym, ið bæði munnu kenna eitt sindur av trýsti á sær*

*Mynd: www.nsi.fo*

*Løgmans-steypið:*

## Fjórðings-finalurnar

| | |
|---|---|
| kl. 18.00 | Víkingur - B68 |
| kl. 18.00 | NSÍ - EB/Str. |
| kl. 19.00 | 07 Vestur - KÍ |
| kl. 19.30 | ÍF - AB |

# Fýra rúka út í kvøld

**FÓTBÓLTUR** Bert vinnararnir í teimum fýra fjórðingsfinalunum í kappingini um Løgmanssteypið sleppa víðari, so fýra lið rúka úr steypakappingini í kvøld

Hilmar Jan Hansen

Tvey av fremstu liðunum á stigatalvuni í Vodafonedeildini, NSÍ og EB/Streymur, møtast við Løkin í Runavík, har stórt trýst man liggja á báðum pørtum. NSÍ hevur ikki verið í finaluni síðani 2004, meðan EB/Streymur hinvegin hevur verið fastur táttur í síðstu fýra finalunum. Hetta kann gerast ein javnur og spennandi dystur, har hvørki liðið vil boyggja seg.

Dysturin í Sarpugerði í Norðragøtu er ein rein eysturoyaruppgerð, tá Víkingur tekur ímóti B68. Her kann eisini alt henda, tí meðan Víkingur snávaði á heimavølli ímóti 07 Vestur um vikuskiftið, fekk B68 fyrstu ferð fult í sínum dysti á Sandi. Eisini her kann roknast við einum dysti, har bæði vilja gera sítt ítarsta fyri at vinna.

Í Sørvági verður talan óivað eisini um ein opnan dyst millum tveir uppflytarar, tí har hittast 07 Vestur og KÍ. Serliga KÍ hevur havt vind í seglunum og telist millum fremstu liðini, meðan 07 Vestur kanska ikki hevur fingið øll tey stigini, liðið kundi havt uppiborið í fyrstu dystunum. KÍ er kanska lítil favorittur undan dystinum, men fær einki ókeypis frá vágamonnum.

Á pappírinum hevur ÍF lættastu uppgávuna, tí liðið á heimavølli tekur ímóti AB, sum flutti niður í fjør og ikki hevur staðið seg betur enn næstbest í 1. deild hjá monnum higartil í ár. Tað sigur kanska sítt, at ÍF fríggjakvøldið vann greitt á HB, samstundis sum AB leygardagin tapti fyri næstbestu manningini hjá HB. Her er ÍF stórfavorittur.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Hondbóltur á Leynar-sandi

Hilmar Jan Hansen

Hondbóltsfelagið í Kvívík, HC Kvívík, fer í summar at skipa fyri kapping í strandarhondbólti á Leynarsandi. Kappingin verður leygardagin 23. juli frá fyrrapartinum og langt út á kvøldið, og kappast verður bæði við kvinnuliðum, mansliðum og blandaðum liðum.

Reglurnar fyri strandarhondbólt eru eitt sindur øðrvísi enn fyri vanligan hondbólt. Spælararnir eru fýra í tali, tríggir útispælarar og ein málverji, og ikki er loyvt at dribla. Skalt tú vinna ein dyst, skalt tú vinna tveir hálvleikir, so um liðini vinna hvør sín hálvleik, skal dysturin gerast av við brotskøstum.

Maðurin aftan fyri hesa nýggju kappingina er Morten Hust Petersen, sum á gallaveitsluni í Vági leygarkvøldið greiddi stutt frá kappingini og royndi at eggja hondbóltsfólkinum til at taka væl ímóti henni. Hetta slagið av hondbólti kom Morten í samband við, tá hann fyri nøkrum árum síðani starvaðist sum venjari í Ný Sælandi.

hilmarjan@sosialurin.fo

# FM í hálvum marathon

Leygardagin skipar Bragdið í Havn fyri føroyameistarakapping í hálvum marathon. Umframt at talan er um eina FM-kapping, er hetta eisini opin kapping, so øllum eru vælkomin at vera við.

Teinurin, sum er 21,1 kilometrar langur, byrjar og endar á Bursatanga. Sum undanfarin ár, verður runnið fimm ferðir frá Bursatanga til tyrlupallin yviri við Strond og aftur. Byrjað verður miðskeiðis millum Café Natúr og Carello, og runnið verður rundan um Café Natúr til tyrlupallin, har vent verður heimaftur.

Kappast verður í fleiri bólkum, sum eru kvinnur og menn, fødd millum 1965 og 1995, veteranar hjá kvinnum og monnum, fødd millum 1956 og 1965, og at enda superveteranar, sum eru kvinnur og menn, fødd í 1955 ella áðrenn.

hilmarjan@sosialurin.fo